# 6. b í Argja skúla vann fiskikapping

**SKÚLI**
*Tíðindaskriv*



6. b flokkur í Argja skúla vann fiskikappingina Á flot við Westward Ho 2009. Eftir morgunsangin í Argja skúla í morgun fingu tey og lærarin Jóanes Árting steyp frá Heðini Mortensen borgarstjóra.

Fongurin hjá 6.. b var toskur, hýsa og longa. Dómsnevndin staðfesti at veidda slagið var gott og at størsti parturin toskur.

Vinnandi flokkurin fekk steyp við áskrift og 100 ára merki, eisini at seta í bringuna.

- Vónandi verða enn fleiri flokkar við í átakinum næsta ár, segði Heðin Mortensen borgarstjóri, tá hann handaði vinnandi flokkinum steypið.

Tá høvdu allir næmingarnir í skúlanum sungið um Dáan meðan Eyðun á Borg spældi gittar. Eftir lívsfríska morgunsangin las skúlastjórin Marjun Holm faðir vár.

Fýra skúlar hava verið við í tiltakinum Á flot við Westward Ho 2009. Tiltakið er ein slupptúrur, ið er skipaður sum fiskikapping, har 4. - 7. flokkarnir í Tórshavnar kommunu kunnu vera við.

Endamálið er, at næmingarnir í hesum aldursbólki fáa høvi at hava samband við sjógvin og fáa eina fatan av siglingarsøguni. Høvi er at royna seg á sluppdekki umborð á Westward Ho, sum taldist millum tær nógvu sluppirnar, ið komu til Føroya úr Onglandi eftir 1872. Á fiskitúrinum sleppa næmingarnir m.a.:

- at royna ymiskan fiskireiðskap
- at kenna tey mest vanligu fiskasløgini
- at kanna fisk
- at kryvja, avhøvda og greipa

Í vár varð skipað fyri einum túri, har lærararnir í náttúru og tøkni og skúlaleiðararnir vórðu bodnir við at royna túrin. Tann túrurin eydnaðist væl, og lærararnir vóru sera hugagóðir at fiska, teir fiskaðu saman tveir og tveir og kappaðust um at fiska mest.

Túrarnir, sum næmingarnir hava verið í ár, eru eisini skipaðir sum ein kapping millum flokkarnar, sum hava tikið lut. Flokkurin, sum hevur fiskað mest og fingið flest stig, er núverandi 6. b flokkur í Argja skúla og fær hesin steyp til ognar. Ikki bert veidda nøgdin telur við í kappingini, men eisini hvat slag fiskað verður, t.d. telur toskur 1,4 stig og hýsa 1,3 stig. Fært tú til dømis ein tosk, sum vigar 1 kg, tá hann er kruvdur, verður uppskrivaða vektin 1,4 kg.



# Guttormur týðir Georg Klein

**BÓKAÚTGÁVA**

Á forlagnum "Rísandi Sól" er komin út bók, "Lítaleysa skapanarverkið og lívsins sorgarleikur" eftir Georg Klein, ið A. Guttormur Djurhuus hevur týtt úr svenskum. Bókin er eitt savn av sjálvstøðugum stuttritum.

Georg Klein, professari, ið er altjóða kendur krabbameinsgranskari, staðfestir sakliga í innganginum til nýggju bók sína, at menniskjan er vorðin til, sum eitt úrslit av evolutiónini. Vit verða rikin av okkara arvaðu forritum til at lívbjarga og nøra okkum, og at nøkur onnur ætlan ikki er til. Samstundis skrivar hann við virðing, um tann av evolutiónini skapaða heilan, og hansara ótrúligu evni til í sjálvum menniskjanum at kunna rúma ein heim av málum, kunnleika, tónleiki, bókmentum og eitt hav av kenslum.

Í hesi bókini eru trý stór stuttrit. Klein festir seg við tey boð, sum alis- og lívfrøðingurin Leo Szilard einaferð orðaði, og nevnir hann tey ein vegvísara í tí vegleysa, hjá einum djúpt moralskum ateisti. Í "Áskoðaraplássið og leikpallurin" heldur hann seg síggja ein svenskan friðarskaða og førleikamiss til at kenna aftur óndskapin, tá hann kemur til sjóndar. Og at enda verður hann bergtikin av teimum týðandi yvirlivilsisteknum, sum yrkingin og tónleikurin veitir okkum, tá vit hava mest tørv á teimum.




Stuttritini í Lýtaleysa skapanarverkið og lívsins sorgarleikur koma inn á týðandi spurningar, sum viðkoma okkum øllum, og ger hann tað á ein persónligan hátt – serliga ritgerðin um Szilard gerst til eitt av Georg Klein væl ígjøgnumhugsað credo.

Georg Klein var og vitjaði á Sosialinum í summar, og høvdu vit tá samrøðu við hann um krabbameinsgransking.

# Løgtingslimir eygleiða EFTA-tingnevnd

**POLITIKKUR**
*Tíðindaskriv*

Miðskeiðis í desember mánaði í ár fáa limir í Uttanlandsnevndini møguleikan at fara til Genevé, har høvuðssætið hjá altjóða handilsfelagsskapinum EFTA liggur. Uppgávan hjá føroysku tinglimunum verður at eygleiða fundir hjá EFTA-tingnevndini.

- Seinasta heyst var tingnevndin hjá EFTA á kunnandi vitjan í Føroyum. Vit reistu tá spurningurin um møguliga føroyska eygleiðarastøðu. Hetta fyri at styrkja vitanina og tilvitanina fyri arbeiðinum hjá EFTA. Vit taka tí væl ímóti innbjóðingini, sum nú er komin, sigur John Johannessen, formaður í Uttanlandsnevndini hjá løgtinginum.

EFTA-tingnevndin er ein pallur hjá tingfólkum í teimum fýra limalondunum Íslandi, Liktinstein, Noreg og Sveis at hittast. Yvirskipað nemir tingnevndin við øll mál, sum EFTA viðger. Seinnu árini hevur tingnevndin serliga viðgjørt handilsavtalur við triðjalond, sum EFTA hevur sett í gildið.

- Føroyska eygleiðarastøðan í EFTA-tingnevndini er ein liður í ætlanini at skapa eitt tættari samstarv millum Føroyar og EFTA londini. EFTA hevur sterk handilssambond uttanfyri Evropa, og er í dag tann felagsskapur, ið hevur eina flest fríhandilsavtalur um allan heim. Tað er einki dulsmál, at mongu handilsavtalurnar, sum EFTA hevur við triðjalond, eru av serligum áhuga hjá Føroyum,, heldur Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri.

EFTA hevur fríhandilsavtalur við 27 lond. Talan er um lond úr Evropa, Afrika, Norður- og Suður Amerika og Asia.

Frammanundan hava Føroyar eygleiðarastøðu í COCE, sum er tollnevndin hjá EFTA.